## Skulu útflyta vatn

Býráðið í Hafnarfirði í Íslandi samtykti fyrr í vikuni at geva felagnum Glacier World loyvi at taka vatn á einum staði í kommununi og at flyta tað av landinum í bingjum ella tangaskipum. Sambært Morgunblaðnum eru tað íleggjarar í Saudiarabia, sum standa aftan fyri verkætlanina. Borgarstjórin í Hafnarfirði, Luðvík Geirsson, sigur við blaðið, at felagið ætlar at byggja eitt áfyllivirki í kommununi, og at har verða umleið 50 arbeiðspláss.



## Fólkatalið á útoyggj minkað

Størsta minkingin er á Stóru Dímun, har fólkatalið er farið úr 11 niður í 8 fólk. Útoyggjarnar hava tað ikki gott, fólkatalið á útoyggjunum er farið niður við 3,6 prosentum frá 1. januar til 1. mai í ár - ein minking upp á 12 fólk fyrstu fýra mánaðirnar í ár. 1. januar búðu 333 fólk á útoyggjunum, 1. februar var fólkatalið 329, 1. mars 323, 1. apríl 320 og 1. mai 321. Heldur henda gongdin fram, so ganga ikki nógv ár, til tað er øskukalt nógvastaðni. Í Skúvoy er minkingin eitt fólk, Stóru Dímun trý fólk, Hesti tvey fólk, Húsum eitt fólk, Svínoy eitt fólk og á Kirkju eitt fólk. Fólkatalið er óbroytt fyrstu fýra mánaðirnar í: Mikladali Trøllanesi, Syðradali, Koltri og Mykinesi. Tað er bara í Hattarvík, at fólkatalið er økt - økingin er eitt fólk.

# Peningastovnar flyta til Danmarkar

**Samstarvsavtalan, sum Elektron í dag hevur gjørt við BEC, merkir, at danska felagið hereftir skal veita føroysku peningastovnunum tær tænastur, sum Elektron hingartil hevur veitt. Elektron skal hinvegin nú veita KT-tænastur til Bankernes EDB Central**

SAMSTARV

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað er eingin loyna, at føroysku peningastovnarnir í mong ár hava havt eitt ynski um, at flyta sítt virksemi inna KT-økið av landinum. Seinast roynt varð, løgdu politikararnir seg ímillum og steðgaðu ætlanunum, men síðani er lógin um persónsupplýsningar broytt, so nú er eingin forðan longur fyri, at KT-virksemið hjá bankunum verður flutt til Danmarkar.

Niels Christian Nolsøe, stjóri í Elektron, sigur, at avtalan gevur KT fyritøkuni nýggjar, stórar møguleikar at specialisera seg,, samstundis sum avtalan er lopfjølin hjá fyritøkuni út í heim.

- Nú BEC yvirtekur føroysku peningastovnarnar frá okkum, gevur hetta okkum møguleikar at menna fyritøkuna innan serstøk øki, samstundis sum vit gerast sjónlig uttan fyri landoddarnar. Og tá verður tað lættari hjá okkum at lokka starvsfólk til okkum, nakað, sum stórur mangul annars er á, sigur Niels Christian Nolsøe.

Hann vísir víðari á, at Elektron frá at hava fýra kundar nú í staðin fáa 75.

Eisini Marner Jacobsen, forstjóri í Eik Banka og nevndarformaður í Elektron, er væl nøgdur við nýggju samstarvsavtaluna millum Elektron og BEC.

- Sjálvt um avtalan í fyrstu syftu gongur yvir átta ár, so er tað lagt upp til eitt varandi samstarv. Og hetta gevur Elektron stórar og nýggjar møguleikar, tí føroyski marknaðurin er lítil. Nýggjar avbjóðingar standa fyri framman, tí virksemið hjá bankunum økist. Fyri fáum árum síðani var virðisbrævahandil næstan ikki til, einki virksemi var uttanlands og bankarnir vóru ikki børsnoteraðir, segði Marner Jacobsen.

Hann fjaldi kortini yvir, at fyri bankarnar fer flytingin at merkja ein bíligari rakstur, og tað vigaði tungt í avgerðini.

- Men í heila tikið er her talan um eina win-win støðu. Tí samstundis sum peningastovnarnir fáa eina bíligari loysn, letur avtalan dyrnar upp fyri Elektron út í heim, sigur Marner Jacobsen.

### Einans fyrimunir

Nevndarformaðurin í Elektron vísti víðari á, at tað er ógvuliga trupult at fáa fatur á dugnaligum KT-starvsfólkum.

- Møguleikarnir eru ógvuliga avmarkaðir. Tað er onga aðra staðni enn í Føroyum, at tú finnur KT-starvsfólk, sum kenna danska marknaðin og samstundis tosa danskt, sigur Marner Jacobsen.

Eisini forstjórin í BEC, Leo Svendsen, fegnaðist um, at føroysku bankarnir nú hava gjørt av at gerast limir í felagnum.




*Niels Christian Nolsøe, stjóri á Elektron, og Leo Svendsen, forstjóri í BEC, skriva undir samstarvsavtaluna*

*Mynd: Eirikur Meitilberg*

- Við at fáa teir fýra føroysku peningastovnarnar aftrat teimum 71, sum framman undan eru í BEC, gerast vit enn sterkari. Tað sum vit leggja serligan dent á er, at okkara tænastur skulu verða betri og ikki minst bíligari enn hjá øðrum, og tann møguleikin er størri nú, tá vit hava dagliga atgongd til Elektron, sigur Leo Svendsen.

Krøvini frá kundunum er mong og ymisk, og tað krevur, at útboðið av tænastum hjá BEC er ógvuliga breitt. Og hetta er nakað, sum kemur at koma føroysku peningastovnunum og harvið kundunum til góða.

Breiða útboðið hjá BEC merkir millum annað, at peningastovnarnir skjótari kunnu laga seg til broytt lógar- og sektorkrøv.

- Flytingin yvir til BEC-skipanirnar er ein sera stór KT-verkætlan í sær sjálvum, og krevur nógv fólk við hollari vitan. Arbeiðið byrjar nú og tekur umleið eitt ár, sigur Niels Christian Nolsøe.



*Umboð fyri føroysku peningastovnarnar, Elektron og BEC. Frá vinstru: Marner Jacobsen, forstjóri í Eik og nevndarformaður í Elektron, Rúni Heðinson, varastjóri í Suðuroyar Sparikassa, Niels Christian Nolsøe, stjóri í Elektron, Leo Svendsen, forstjóri í BEC, Súni Schwartz Jacobsen, stjóri í Føroya Banka og Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa*

*Mynd: Eirikur Meitilberg*